Bara gullið telur

Frank Lampard ivast ikki í, at hann og Ongland hava góðar møguleikar at vinna HM-heitið fyri fyrstu ferð í 40 ár.

– Fólk tosa um, at tað er flott, um vit røkka hálvfinaluni, men soleiðis hugsi eg ikki. Veruleikin er, at alt annað enn sjálvt HM-heitið er eitt stórt vónbrot fyri okkum. Vit hava nógvar spælarar í altjóða topp-klassa, og vit hava sterkar persónligheitir. So vit eiga at hava dygdirnar, sum skulu til, heldur miðvallarmotorurin hjá Chelsea og landsliðnum.

-mørk



Ein tjóð gjørdist til 15

Tá Sovjetsamveldið av álvara skrædnaði í 1991, segði fótbóltsheimurin samstundis farvæl til eina sera sterka fótbóltstjóð. Umframt Russland gjørdist talan nú um 14 ymiskar fótbótlstjóðir, og tað hevur sett síni merki á fótbóltskortið. Ikki minst á undankappingarnar til HM og EM og til UEFA-kappingarnar fyri feløg. Russland er í dag á 37 plássi á FIFA-styrkislistanum. Ukraina verður roknað sum sterkasta av fyrrverandi lýðveldunum hjá Russlandi. Sheva & co. eru at finna sum nummar 41.

-mørk

Sheva er stóra vónin

Ukraina vann sannførandi í einum sterkum undankappingarbólki. Spurningurin er nú, hvussu langt landið kann røkka í fyrstu HM-luttøkuni. Ein spurningur, sum eisini er nær tengdur at Andriy Shevchenko

HM BÓLKUR H
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Talan var kanska um ársins handil, tá Chelsea fyri stuttum kundi boða frá, at teir fyri góðar 300 mió kr. hava keypt Andriy Shevchenko úr AC Milan. Talan er um nógvar pengar fyri ein fótbóltsspælara, og sjálvt ikki Roman Abramovich er vanur við at leggja slíkar upphæddir á borðið.

Men tað gjørdi hann tó gleðiliga. Tí í Andriy Shevchenko fær Chelsea ein álopsspælara, sum ikki bara er í heimsflokki. Teir fáa eisini ein spælara, sum gjøgnum fleiri ár hevur sýnt seg sum ein tann sterkasta í krevjandi italsku Seriu A.

Skúgvaðu alt til viks

Og skal tosast um HM, so eru ukrainsku vónirnar sera nær tengdar at Sheva. Í undankappingini, har Danmark, Grikkaland og Turkaland so ruddiliga vórðu skúgvað til viks, var uppskriftin hjá liðnum hampuliga einføld. Snøgt sagt, so ráddi um at standa sera sterkir í verjuni, har kynisnman oftani var í hásætinum, og so skuldi skjótleikin hjá Shevchenko brúkast sum hvast álopssvørð.

Hóast royndirnar tær báðar seinastu ferðirnar vóru miseydnaðar, so var eingin ivi hesaferð. Við seks málum var Shevchenko toppskjútti, tá Ukraina trygt endaði framman fyri Turkaland, og so kundi landið sum hitt fyrsta europeiska fegnast um HM-atgongumerkið.

Og tað er eingin orsøk at halda, at uppskriftin verður stórt øðrvísi hesaferð. Við Oleg Blokhin hevur Ukraina ein venjara, sum í síni tíð hevði nógvar av teimum dygdum, sum í dag eyðkenna Sheva. Og við Vrobey og Voronin hevur nýggi Chelsea-spælarin eisini nakrar álopsfelagar, sum kunnu stuðla í kontraspælinum.

Eyðmjúk stjørna

– Vit mugu seta okkum nøkur realistisk mál, og síðani arbeiða eftir hesum. Eg veit væl, at Blokhin segði, at nú ætla vit at vinna HM, men tað mundi nú vera til stuttleikar. Bara tað, at vit eru her, er nakað stórt fyri okkum, og hóast vit ikki koma víðari, so vil talan vera um eina væl eydnaða kapping fyri okkara viðkomandi.

Soleiðis sigur Sheva sjálvur, og tað er kanska eisini eyðkennandi fyri eyðmjúka spælaran.

Skúlaður í Dynamo Kiev undir legendariska Valerij Lobanovski, er Sheva vanur við, at kollektivið altíð kemur fram um einstaka spælaran. At bæði venjarin og flestu av liðfeløgunum eisini hava gingið í sama skúla, ber við sær, at liðið ikki er heilt so viðbrekið fyri skaðum, og tí hava teir eisini havt ráð til, at ein spælari sum Rebrov als ikki longur vísir tað, sum hann gjørdi fyri tveimumtrimum árum síðani.

Men mannin við sjeytalinum á rygginum fáa teir kortini ikki verið fyriuttan. Um hann vil tað ella ikki, so er Shevchenko fólksins hetja í Ukraina. Fátæka og mangan eyðrænda landið, sum við HM-luttøkuni røkkur einum av stoltastu løtunum í søguni.

Andriy Shevchenko er júst seldur til Chelsea fyri triðings milliard. Ein ófatulig upphædd í fátæka Ukraina, har skjóti og kaldi framherjin í fleiri ár hevur verið roknaður sum landsins ítróttahetja

Mynd: Scanpix